# Dálking kann koppa f

Svend Auken fyrrverandi orku- og umhvørvismálaráðharri í Danmark sigur, at veðurlagsbroytingar og broytingar í streymviðurskiftum, kunnu ávirka fiskistovnarnar og enda við at koppa føroyska búskapinum



UMHVØRVISMÁL

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Fyrrverandi danski orku- og umhvørvisráðharrin Svend Auken kemur í dag til Føroyar í sambandi við, at hann mánadagin skal halda fyrilestur um orku- og umhvørvispolitik. Tað er Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í orkumálum, hevur boðið Auken til Føroya at halda fyrilestur, í samband við, at arbeitt verður við at orða yvirskipaðan orkupolitikk fyri Føroyar.

Svend Auken sigur sjálvur, at hann kemur at bøta um skaðan, sum Bjørn Lomborg gjørdi, tá hann fyri júst einum ári síðan var í Føroyum og helt fyrilestur um sama evnið. Sambært Svend Auken eru teir báðir 100% ósamdir um alt, ið viðvíkjur umhvørvismálum.

**Sera týdningarmikið fyri føroyingar**

Svend Auken sigur, at tað sum Bjørn Lomborg sigur, ikki bara er tvætl, tað er eisini sera vandamikil hugsan. Bjørn Lomborg hevur tí sannføring, at mannaskapta dálkingin ikki hevur tey umhvørvisárin, ið granskarar annars halda. Hetta heldur Svend Auken verða vandamikið á tann hátt, at hetta er at mæla til, at bara lata dálkingina og umhvørvistrupulleikarnar sigla sín egna sjógv. Hetta kann hava sera ringar avleiðingar fyri okkum øll. Veðurlagsbroytingar og broytingar í streymviðurskiftum, kunnu t.d. gerast enn verri, og hetta kann ávirka fiskistovnarnar nógv.

Fyri eitt land sum Føroyar kann hetta gerast sera álvarsamt. Við fiskivinnuni sum høvuðsvinnu kunnu sjálvt smávegis broytingar koppa øllum landsbúskapinum. Tí er umhvørvismál serliga týdningarmikil fyri føroyingar.

Eisini fyri grønlendingar er hetta álvarsamt. Grønland er sambært Auken, tað landið, ið er harðast rakt av klimabroytingum, hetta hevur við sær at innlandsísurin smeltar við ræðandi ferð.

**Orkumál eru áhugaverd fyri øll**

Svend Auken fer umframt umhvørvismál, at tosa um orkumál. Her leggur hann dent á, at tað er líka mikið hvønn politiskan lit tú hevur, og hvørji umhvørvissjónarmið tú hevur. Øll kunnu semjast um, at betri gagnnýtan av orku er vegurin fram. Hetta er galdandi bæði frá umhvørvissjónarmiðinum: "minnið oljunýtsla dálkar minnið", og frá fíggjarliga sjónarmiðinum, "minnið oljunýtsla kostar minnið".

Í Føroyum sær hann stórar møguleikar fyri vindorku, og ætlar at skjóta upp, at samstarv verður fingið í lag við teir granskarar, ið sita á Riisø og arbeiða við royndum við vindorku.

**Sjóvinnan er gloymd**

Hann heldur, at tað er sera óheppið, at so lítið er gjørt við orkueffektivisering í sjóvinnuni, skipini brúka enn sera dálkandi olju. Harumframt verur í hesi vinnu slettis ikki hugsa um betri gagnnýtan av orku. Hetta eigur at verða raðfest. Tildømis eru áhugaverdar royndir gjørdar við vindorku umborð á skipum. Við at brúka vind saman við olju kann oljunýtslan falla. Hetta er eitt framstig bæði fíggjarliga og á umhvørvisøkinum. Her er ikki talan um seglskip, men um okkurt slag av drekum. Hann vísir til nýggjastu útgávuna av